# Roykipolitikkur

Sum Sjúkrahúsverk hava vit eina týdningarmikla ábyrgd at skapa karmar fyri einum roykfríum umhvørvi, so at sjúklingar og starvsfólk verða vard ímóti royki í arbeiðstíðini.

Sum Sjúkrahúsverk ynskja vit at ganga á odda við heilsufremjandi og fyribyrgjandi tiltøkum.

Vit hava øll ábyrgd at skapa eina mentan á arbeiðsplássinum, sum stuðlar starvsfólki í ikki at roykja í arbeiðstíðini.

Frá 1. januar 2022 skal Sjúkrahúsverkið verða roykfrítt.

At Sjúkrahúsverkið er roykfrítt merkir, at starvsfólk ikki kunnu roykja ella nýta e-sigarettir í arbeiðstíðini.

**Kunning**
Í sambandi við, at roykiforboðið í Sjúkrahúsverkinum verður sett í verk, verða skeið boðin út fyrsta árið, sum skulu stuðla starvsfólkunum sum ynskja at leggja av at roykja.

Til ber at brúka nikotinplástur, -tyggigummi, innandingartól ella annað. Hetta fæst til keyps á apotekunum.

Eisini vísa vit til kunning og faldaran hjá apotekinum **her.**

**Avleiðingar**
Um leiðslan verður gjørd varug við, at starvsfólk roykir í arbeiðstíðini, skal nærmasti leiðari skipa fyri eini rættleiðandi samrøðu við viðkomandi.

Endamálið við samrøðuni er at vegleiða og vísa á møguleikar til hjálp at leggja av at roykja.

Um royking í arbeiðstíðini endurtekur seg, skipar nærmasti leiðari fyri nýggjari samrøðu, og tá fær starvsfólkið munnliga ávaring.

Viðkomandi starvsfólk váttar skrivliga at hava fingið munnliga ávaring.

Um royking í arbeiðstíðini aftur endurtekur seg, skipar nærmasti leiðari fyri nýggjari samrøðu, og tá fær starvsfólkið skrivliga ávaring.

Eins og til undanfarnu samrøður, vísir leiðarin á møguleikar til hjálp at leggja av at roykja.

Verður roykiforboðið ikki hildið, hóast munnliga og skrivliga ávaring, er hetta at rokna sum uppsagnargrund.

Ein ávaring fyri royking ella nýtslu av e-sigarrettum er galdandi í eitt ár. Eftir hetta verður hon ógildað.

Leiðslan hevur ábyrgd av, at politikkurin verður framdur í verki, og ynskir at vegleiða, stuðla og eggja starvsfólki í ikki at roykja.

SUÐUROYAR SJÚKRAHÚS
Sjúkrahúsbrekkan 19
FO-800 Tvøroyri
Tel. +298 34 33 00
ssh@ssh.fo
ssh.fo